FRÁGREIÐING UM
UM KANNINGINA

# ARBEIÐSSTØÐAN HJÁ UNGFÓLKI Í FØROYUM HEYSTIÐ 81 OG VÁRIÐ 82

HAGDEILDIN
STØÐISÚTBÚGVINGIN

JULI 1982

# FORMÆLI

Við hesum verður frágreiðing latin landsstýrinum um kanning av arbeiðsstøðuni hjá ungfólki í Føroyum.

Arbeiðið við at fáa upplýsingar til vega, viðgera taltilfarið og skriva hesa frágreiðing er farið fram í tíðarskeiðinum 25. januar til 16. juli 1982.

Vit nýta høvi at takka starvsfólkum á Hagdeildini, Støðisútbúgvingini og P/f Elektron fyri hjálp og beinasemi. Somuleiðis ein tøkk til landsfólkayvirlitið og landsskúlafyrisitingina fyri at veita okkum ávísar upplýsingar. Útvarpi Føroya takka vit eisini fyri hjálp til at veita fólki vegleiðing um kanningina.

Ein serstøk tøkk til øll tey nær um 2400 ungfólkini og avvarðandi, ið hava gjørt sær tann ómak at svara einum spurnablaði og senda tað aftur. Uttan hesa hjálp hevði verið vónleyst at gjørt nakrar álítandi metingar.

Sigurd Poulsen

Sigurd Poulsen

Hagdeildin

Zachariassen

Petur Zachariassen

Støðisútbúgvingin
Fróðskaparsetur Føroya

# INNIHALD


INNGANGUR .......................................... 3

SETNINGUR .......................................... 4

NIÐURSTØÐA .......................................... 5

FÓLKATELJINGAR .......................................... 7

MANNAGONGD

Kanningarhópur .......................................... 9
Høvuðsbólking .......................................... 9
Spurnakanning .......................................... 10
Spurnablað .......................................... 12
Svarhópur .......................................... 14
Umboðan .......................................... 16

KANNINGARÚRSLIT

Høvuðseyðkenni .......................................... 18
Ungdómur í vinnu .......................................... 19
Heystið 81 / várið 82 .......................................... 23
Arbeiðsumstøður .......................................... 24
Ungdómur í útbúgving .......................................... 25

TALVUR & MYNDIR

Leiðbeining til at lesa talvur og myndir

Søguliga gongdin í býtinum av teimum 14-19 ára gomlu í útbúgvingar- og vinnubólkar ..... SKJAL 1

Spurnablað við leiðbeining ................ SKJAL 2

Býtið av bólkunum "í útbúgving", "í vinnu" og "ikki svarað" í mun til høvuðseyðkennini .... SKJAL 3

Inntøkubýtið eftir øki og bólkunum "í útbúgving", "í vinnu" og "ikki svarað" ............ SKJAL 4

Býtið av vinnubólkinum í mun til høvuðseyðkennini .............................. SKJAL 5

Samanbering millum arbeiðsskeiðini um heystið 81(sp.6) og um várið 82(sp.7) .... SKJAL 6

Samanbering millum arbeiðsskeiðið um várið 82 (sp.7) og arbeiðsumstøðurnar v.m.(sp.8-13) .. SKJAL 7

Samanbering millum slag av arbeiði(sp.11) og arbeiðsumstøður(sp.12-13) ................... SKJAL 8

Býtið av útbúgvingarbólkinum í mun til høvuðseyðkennini ........................ SKJAL 9

Slag av útbúgving(sp.2) samanborið við framtíðarætlanir v.m.(sp.3-5) .............. SKJAL 10

# INNGANGUR

Í tingsetuni 198o/81 varð spurningurin um ungdómsarbeiðsloysi viðgjørdur í løgtinginum, og í mars 1981 varð samtykt at áleggja landsstýrinum at seta í verk eina kanning av ungdómsarbeiðsloysinum í Føroyum. Landsstýrið umhugsaði spurningin og vendi sær til Hagdeildina við áheitan um at skipa fyri eini slíkari kanning.

Hagdeildin heitti á Støðisútbúgvingina á Fróðskaparsetrinum um at veita sær hjálp. Skipað varð ein nevnd við Peturi Zachariassen frá Støðisútbúgvingini og Sigurdi Poulsen frá Hagdeildini til at taka sær av kanningini.

Í sambandi við fyrireikingarnar hevði nevndin fund við Eilif Samuelsen, landsstýrismann, Karin Kjølbro, løgtingslim, sum legði málið fyri tingið, Árna Olafsson, skrivstovustjóra í landsstýrinum og Finn Johansen, formann í mentunarnevnd Tórshavnar Býráðs.

Loyvi fekst frá landsstýrinum til at nýta skattaskránna til at útskriva spurnabløð til tey 16-20 ára gomlu, og til at styrkja úrslitið av kanningini varð eisini givið loyvi til at nýta inntøkutølini fyri 1981.

Viðgerðin av teimum innkomnu upplýsingunum fór fram á EDV-tóli hjá P/f Elektron, har útskrivingin av spurnabløðunum varð gjørd.

# SETNINGUR

Høvuðssetningurin hjá nevndini er at kanna ungdómsarbeiðsloysið í Føroyum. Men ongin neyv lýsing av fyribrigdinum arbeiðsloysi í tí føroyska samfelagnum er ásett, hvørki umsitingarliga ella á annan hátt.

Nevndin setti sær tí fyri at kanna arbeiðsstøðuna sum so hjá teimum ungu, soleiðis at skilja, at hon skal meta um hvussu leingi tey ungu hava havt arbeiði í ávísum tíðarskeiði. Eisini skal nevndin so vítt gjørligt vita eftir, um ávísir bólkar millum tey ungu eru verri fyri enn aðrir, eitt nú í mun til kyn, aldur og bústað.

Fyri at fáa eina meira fjølbroytta mynd av arbeiðsstøðuni, varð avgjørt eisini at fáa til vega upplýsingar um einstøk onnur viðurskifti, sum hava við arbeiðsstøðuna at gera, so sum slag av arbeiði og á hvussu nógvum arbeiðsplássum hevur verið arbeitt.

Fyri at fáa eina heildarmynd um øll ungfólk í Føroyum, varð avgjørt eisini at kanna støðuna hjá teimum, sum ganga í skúla ella eru í læru/útbúgving, og her uppií royna at fáa eina mynd av hvat slag av útbúgving, tey ungu eru í holt við.

Gjørt skal verða vart við, at í sambandi við kanningararbeiðið hevur nevndin havt fyri neyðini sjálv at gera ymsar avmarkingar og viðtøkur, fyri m.a. at kunna áseta teir ymsu tættirnar í kanningini og fastseta teir spurningar, ið frásøgufólkini eru biðin um at svara.

# NIÐURSTØÐA

Kanningin fevnir um tvey tíðarskeið: 4 mánaðir um heystið 1981 og 3 mánaðir um várið 1982. Úrslitini benda á, at í hvørjum av hesum skeiðum hava eini 200-300 ungfólk í Føroyum havt arbeiði í minni enn fjórðingin av fullari arbeiðstíð. Eini 160 av teimum, 100 konufólk og 60 mannfólk, vóru í hesi støðu bæði skeiðini, t.e. samanlagt eitt 7 mánaða skeið.

Tey 16-20 ára gomlu býta seg sundur í tveir nærum eins stórar bólkar: ein útbúgvingarbólk og ein vinnubólk.

Prosenttølini niðanfyri vísa, hvussu stórur partur av vinnubólkinum hevur havt arbeiði í minni enn fjórðingin av fullari arbeiðstíð.

| | Heystið 81 | Várið 82 | Bæði skeiðini |
|---|---|---|---|
| Øll | 12 % | 15 % | 8 % |
| Mannfólk | 9 % | 13 % | 5 % |
| Konufólk | 16 % | 18 % | 10 % |

Stórur munur er at síggja millum mannfólk og konufólk. Konufólkini hava sum heild minni arbeiði, og serliga sjónskt er tað, tá bæði skeiðini verða tikin saman. Eisini sæst støðan sum heild av vera versnað frá heysti 81 til vár 82.

Í samanteljingunum er landið býtt sundur í fimm øki (síða 18). Suðureysturoy tykist at vera best fyri, har eru tølini 7 % um heystið 81 og 11 % um várið 82, og økini Sandoy-Suðuroy og Norðoyar ringast fyri, 12-15 % um heystið 81 og 20-21 % um várið 82.

Viðvíkjandi aldri skilja tey 20 ára gomlu seg burturúr. Hesi hava havt arbeiði í longri tíðarskeið enn tey yngru.

Verður hugt at slagi av arbeiði sæst, at fiskaarbeiði á landi víkir frá, har eru 18 %, sum hava havt arbeiði minni enn fjórðingin av arbeiðstíðini í mun til 8-15 %

fyri onnur arbeiði.

Býtið av slagi av arbeiði er annars ymiskt, hvar í landinum ein er. T.d. eru upp á seg fleiri dreingir úr teimum smæstu kommununum, ið rógva út ella eru til skips. Aldursbýtið bendir á, at fleiri yngri rógva út ella eru til skips.

Av teimum, sum eru í útbúgving, ganga 36 % á HF/studentaskúla. Sætti hvør av teimum siga seg vera farin á henda skúla, tí at fáir møguleikar vóru fyri arbeiði ella yrkisútbúgving.

Um leið triði hvør av teimum, sum fingu spurnablað sendandi, hava ikki svarað. Spurningurin er nú, um tey ymsu býtini, ið eru funnin í svarhópinum, og sum úrslitini byggja á, eisini eru at finna hjá teimum, ið ikki svaraðu. Nøkur tekin benda á, at so er, t.e. úrslitini kunnu gerast til heildarmetingar, meðan onnur tekin benda á, at serliga úrslitini viðvíkjandi teimum fimm økjunum mugu takast við fyrivarni.

Dentur skal leggjast á, at omanfyri nevndu úrslit umboða eitt 7 mánaða skeið hetta seinasta árið. Av tí, at kanningar sum henda ikki eru gjørdar í Føroyum áður, er nevndin ikki før fyri at meta um møguligar broytingar í arbeiðsstøðuni hjá teimum ungu seinastu árini.

# FÓLKATELJINGAR

Hagtøl um arbeiðsloysi í øðrum londum byggja vanliga á onkra fyrisitingarliga skráseting, har regluligar uppgerðir so verða gjørdar. Í Danmark t.d. skipar Arbejdsformidlingen fyri eini uppteljing hvønn mikudag. Í Føroyum hava vit onga tílíka skráseting.

Tað nærmasta vit koma eini skráseting um arbeiðsviðurskiftini hjá føroyingum sum heild eru fólkateljingar, har fólk eru spurd um arbeiðsstøðuna ein ávísan dag. Fólkateljingar hava verið í Føroyum við jøvnum millumbilum, tær seinastu í 1966, 1970 og 1977. Har eru hagtøl at finna um m.a. býtið í ymsar vinnugreinir og aldursbólkar.

Fyri at fáa eina mynd av tí søguligu gongdini, eru funnin nøkur tøl frá trimum teimum seinastu fólkateljingunum. Tølini eru sett upp í skjali 1 og vísa býtið av 14-19 ára gomlum dreingjum og gentum í nakrar útbúgvingar- og vinnubólkar.

Av skjali 1 sæst, at bólkurin, ið gongur í skúla, er øktur munandi. Av dreingjum eru 32 % í skúla í 1966 móti 47 % í 1977, og fyri gentur eru tølini 38 % og 59 %. Allir aðrir bólkar eru lutfalsliga minkaðir frá 1966 til 1977 uttan bólkurin fiskaarbeiði á landi, sum fyri bæði gentur og dreingir er øktur úr 2 til 7-8 %, og bólkurin av gentum, ið fáast við reingerð og køksarbeiði, er vaksin. Eisini sæst, at nógv færri gentur hava húspláss í 1977 og 1970 enn í 1966.

Eina beinleiðis samanbering millum hesa kanning frá 1981/82 og fólkateljingina í 1977 ber illa til at gera. Munur er á sjálvum grundupplýsingunum: Í hesari kanningini eru fólk spurd um, hvussu nógv arbeiði tey hava havt í einum tíðarskeiði, meðan í fólkateljingunum eru fólk sum nevnt spurd um arbeiðsstøðuna ein ávísan dag.

Kortini er ein roynd gjørd at bera vinnu- og útbúgvingarbýtið saman, men ein tillaging av tølunum er neyðug. Tey 14-15 ára gomlu mugu takast úr tølunum frá fólkateljingini og tey 20 ára gomlu úr tølunum frá hesi kanningini. Ein leyslig meting bendir á, at skúla/útbúgvingarbólkurin er heldur størri í 1981/82 enn í 1977. Býtið í vinnugreinir tykist at vera á leið tað sama, tó eru fleiri konufólk í fiskaarbeiði á landi í 1981/82 í mun til 1977.

Her skal eisini nevnast ein kanning, sum næmingar á Sjúkrasystraskúla Føroya skipaðu fyri um ársskiftið 1981/82. Kanningin fevndi um tey ungfólk í sunnaru helvt av Suðuroy, sum vóru liðug í framhaldsdeildini 1978/81. Tey flestu vóru sostatt 16-20 ára gomul, tá kanningin fór fram. 38 % søgdu seg at hava fast arbeiði og 37 % vóru í skúla/útbúgving. Hesi tølini samsvara væl við m.a. úrslitini í skjali 3 og skjali 5 síðu 2.

MANNAGONGD

KANNINGARHÓPUR

Í fyrstu atløgu var kanningin ætlað at fevna um tey 17-19 ára gomlu. Í hesum aldursbólki eru at kalla øll farin úr fólkaskúlanum, men hava ikki lokið eina yrkisútbúgving.

Nógv tey flestu 16 ára gomlu ganga í skúla, meginparturin í framhaldsdeildini (9. og 10. flokki), nøkur fá í 1. g á studentaskúlanum. Fyri at vita hvussu arbeiðsstøðan er hjá teimum 16 ára gomlu, ið ikki ganga í skúla, varð avgjørt, at kanningin eisini skuldi fevna um tann árgangin.

Millum tey 20 ára gomlu eru nøkur fá, ið hava lokið eina yrkisútbúgving, men má meginparturin, hvat arbeiði viðvíkur, roknast at vera í somu støðu sum tey 17-19 ára gomlu. Hjá teimum, sum eru eldri enn 20 ár, er støðan í mangar mátar broytt so mikið, at nevndin helt tað vera at fara út um uppgávu sína, at kanna arbeiðsstøðuna hjá hesum aldursbólkinum. Ein munandi partur av teimum hevur tá lokið eina yrkisútbúgving, summi hava eisini sett búgv og stovnað familju.

Kanningin kom sostatt at snúgva seg um aldursbólkin 16-20 ár. Sum áður nevnt fer ongin skráseting fram, har hildið verður skil á, um tey ungu ganga í skúla, eru í læru, arbeiða ella ikki. Tí varð avgjørt, at kanningarhópurin - t.e. tann bólkurin av føroyingum, sum kanningin skal geva eina meting um - skal fevna um øll 16-20 ára gomul ungfólk í Føroyum.

HØVUÐSBÓLKING

Sum vera man kann arbeiðsstøðan hjá einum persóni broytast frá einum degi til annan. Metingar um arbeiðsstøðuna byggja tí ofta á, at fólk verða spurd, hvat tey tókust við ein ávísan gerandisdag. Hugsa vit okkum, at ein tílíkur spurningur verður settur teimum 16-20 ára gomlu, so kunnu tey býtast sundur í fýra høvuðsbólkar, eftir um tey tann dagin:

- ganga á studentaskúla/HF ella á øðrum skúla — bólkur S
- eru í holt við eina yrkisútbúgving — bólkur Y
- hava eitthvørt arbeiði — bólkur A
- einki arbeiði hava — bólkur E

Broyting í arbeiðsstøðuni hjá einum persóni kann nú lýsast við, at viðkomandi fer úr einum bólki í annan; vit kunnu siga, at ein "flyting" fer fram. Í einum ávísum tíðarskeiði, t.d. einum skúlaári, er ójavnt hvussu stór flytingin er millum hesar bólkar. Sjálvsagt er lítil og eingin flyting úr og í S í tí førinum, nakrar flytingar kunnu vera úr og í bólki Y. Er torført at fáa arbeiði tað árið, so er ivaleyst størri flyting úr bólki A í bólk E enn øvugt.

Tey, sum ein ávísan dag eru í bólki S ella bólki Y, siga vit eru í útbúgving, og tey, sum eru í bólki A ella E, siga vit eru í vinnu. Av praktiskum grundum verða hesi heiti brúkt, hóast tey ikki í øllum førum eru líka beinrakin: t.d. tey, sum onki arbeiði hava, siga vit eru í vinnu, og tey, sum eru í læru, virka ein stóran part av lærutíðini á einum arbeiðsplássi.

Nevndin heldur tað vera umráðandi, at metingar fyrst av øllum verða gjørdar av teimum stóru linjunum í arbeiðsviðurskiftunum. Nevndu bólkingar eru gjørdar við hesum fyri eyga - eitt stig til at gera problematikkin so einfaldan sum gjørligt, uttan tó at káva útyvir týðandi fyribrigdi.

## SPURNAKANNING

Fyri at fáa eitt haldgott grundarlag til vega, er neyðugt at spyrja nógv fólk um arbeiðsstøðu teirra. Tey fólk í kanningarhópinum, ið verða biðin um at svara, nevna vit frásøgufólk. Tá frásøgufólk verða spurd eru stórt sæð tvær leiðir at ganga, antin at nýta

Interview-teknikk: ein spyrjari vitjar frásøgufólkini,

sum verða spurd og spyrjarin festir svarini á blað

ella

Enquete-teknikk: frásøgufólkini fáa sendandi eitt spurnarblað, sum tey sjálvi fylla út og senda aftur.

Við interview-teknikkinum ber til at spyrja nokk so nágreiniliga. Verri er hjá frásøgufólkinum at bera seg undan, og yvirhøvur kann ein rokna við álítandi svari. Skulu nógv fólk spyrjast, t.d. fleiri hundrað, so er hesin teknikkurin sera kostnaðarmikil og tvørligur.

Tað, sum umræður í hesi kanningini, er sum nevnt at meta um tær stóru linjurnar, og tað leggur upp til, at fáir og einfaldir spurningar verða settir nógvum fólkum. Einamest av hesi orsøk varð enquete-teknikkurin valdur. Men havast má í huga, at við tí teknikkinum er vandi fyri stórum fráfalli, tað at frásøgufólk av eini ella aðrari grund bera seg undan at svara (hesin tátturin verður viðgjørdur í pettinum UMBOÐAN).

Spurningurin er nú hvussu nógv og hvørji í kanningarhópinum skulu vera frásøgufólk. Ynskiligt er at fáa eina mynd av arbeiðsstøðuni ymsastaðni í landinum, og tí er neyðugt við nógvum frásøgufólkum kring landið. Um leið 4100 ungfólk á 16-20 ára aldri eru í Føroyum, so eru umstøðurnar til staðar, skuldi borið til at vent sær til øll í kanningarhópinum.

Til at fáa fatur í frásøgufólkunum fekk nevndin loyvi frá landsstýrinum til at brúka navna- og bústaðarupplýsingarnar í skattaskránni, sum finst á EDV-tóli hjá P/F ELEKTRON. Undir teimum umstøðum bar væl til at venda sær til øll tey 16-20 ára gomlu, ið standa í skattaskránni - og so varð gjørt. 1. februar 1982 varð settur skeringsdagur fyri aldurin, so spurnahópurin, t.e. øll frásøgufólkini, eru tey í skattaskránni, sum 1. februar 1982 høvdu fylt 16 ár og ikki vóru eldri enn 20 ár.

Eftir tí, sum skattavaldið upplýsir, eru so at siga øll 17 ára gomul og eldri við í skattaskránni, men ikki øll tey 16 ára gomlu kunnu væntast at vera komin við.

26. og 27. mars 1982 varð eitt postkort við einum spurnablaði heft við sent øllum frásøgufólkunum. Spurnablaðið kundi skræðast frá og sendast til Hagdeildina. Freistin at senda spurnablaðið aftur varð sett til eina viku seinni: 3. apríl 1982.

SPURNABLAÐ

Skipanin av spurningunum á spurnablaðnum er lagað eftir tí høvuðsbólking, sum er umrødd frammanfyri. Spurningur 1 hevur soleiðis tveir svarmøguleikar, har tann fyrri er til tey frásøgufólk, sum eru í útbúgving og hin seinni til tey, ið eru í vinnu. Samsvarandi hesum eru hinir spurningarnir í tveimum: spurningar 2-5 til teirra, ið eru í útbúgving og spurningarnir 6-13 til teirra, ið eru í vinnu (sí spurnablaðið í skjali 6).

Bólkin "í vinnu" hava vit áður býtt sundur í tvey: tey fólk, sum ein ávísan gerandisdag høvdu eitthvørt arbeiði (A), og tey, sum sama dag einki arbeiði høvdu (E). Nevndin helt ikki eina tílíka sundurbýting vera ta frægastu í hesum førinum. Fyri tað fyrsta eru umstøðurnar á summum arbeiðsplássum, serliga í fiskivinnuni, sera umskiftiligar, so stórur vandi er fyri, at ein ávísur dagur gevur eina skeiva mynd. Harnæst hildu vit tað vera møguligt at spyrja soleiðis, at ein mynd kann fáast av arbeiðsstøðuni í einum tíðarskeiði.

Avgjørt varð at biðja frásøgufólkini um at meta um á leið hvussu nógvar dagar tey vóru til arbeiðis í einum ávísum tíðarskeiði, og seta kross í samsvar við ein av trimum ella fýra svarmøguleikum. Á tann hátt komu spurningarnir 6 og 7 í lag, hin fyrri til tíðarskeiðið frá 17. august 1981 til jóla 1981 og hin seinni til tíðarskeiðið frá 4. januar 1982 til 28. mars 1982.

Í 1982, frá 4. januar til 28. mars, verða roknaðir 60 arbeiðsdagar (12 vikur við 5 arbeiðsdøgum hvør)

6 *Um leið hvussu leingi vart tú í arbeiði heystið 1981 frá 17. august til jóla?*

- ☐ styttri enn ein mánað
- ☐ 1-2 mánaðir
- ☐ 3-4 mánaðir

7 *Um leið hvussu nógvar dagar hesar tríggjar mánaðirnar hevur tú verið í arbeiði?*

- 1☐ færri enn 10 dagar
- 2☐ 10-20 dagar
- 3☐ 21-50 dagar
- 4☐ fleiri enn 50-dagar

Umframt hesar báðar lyklaspurningarnar verða spurningar settir frásøgufólkunum um hvussu nógvastaðni tey hava roynt at fáa arbeiði (sp. 8), á hvussu nógvum arbeiðsplássum tey hava verið (sp. 10), hvat slag av arbeiði, tey høvdu seinast(sp.11) - um tey yvirhøvur hava havt nakað arbeiði í nevndu tíðarskeiðum. Eisini verður spurt um arbeiðstíð (sp. 12) og um frástøðu millum bústað og arbeiðspláss (sp. 13).

Tey frásøgufólk, sum eru í útbúgving, verða spurd um slag av útbúgving (sp. 2). Tey, sum eru í læru, verða spurd, um tey vænta sær arbeiði á læruplássinum, tá lærutíðin er av (sp. 4), og tey sum ganga ella hava gingið á HF/studentaskúla, um orsøkina til at tey fóru á henda skúla (sp. 5).

Øll verða spurd um ætlanirnar í nærmastu framtíð (sp. 3 og sp. 9).

Spurnablaðið kann tykjast heldur rúgvismikið, men hjá hvørjum eru í mesta lagi níggju spurningar at svara, og við hvønn spurning skal ein krossur setast við tann eina av svarmøguleikunum; í mesta lagi fimm svarmøguleikar eru.

SVARHÓPUR

Myndin niðanfyri vísir, hvussu teir ymsu hóparnir hanga saman, og tølini vísa, hvussu nógv av ungfólki er í hvørjum hópi.




Landsfólkayvirlitið hevur higartil havt manuellar skráir skipaðar eftir bústaði og navni, so tað hevur ikki borið til at fáa eitt neyvt tal fyri kanningarhópin. Talið 4100 er grundað á fólkateljingina frá 1977, og tað hevur ikki verið roknað við munandi nettoflyting í hesum aldursbólki.

Tey umleið 600 ungfólkini, ið ikki komu við í spurnahópin, eru flest øll 16 ár. Hetta gjørdi skattavaldið vart við, og tað sæst eisini í skjali 3, at í spurnahópinum eru bert 391 16 ára gomul, meðan tilsamans eiga at vera eini 850 16 ára gomul í Føroyum.

Av teimum 3484 útsendu spurnabløðunum vórðu 2405 aftursend. 61 av teimum aftursendu bløðunum vórðu ikki svarað, tí at bústaðurin hjá frásøgufólkunum var ikki tann rætti. Nógv sendu spurnablað aftur, ið ikki var svarað til fulnar, av onkrari orsøk hava hesi ikki svarað einstøkum spurningum. Í fleiri førum hevur ein avvarðandi svarað fyri frásøgufólkið, og av góðum grundum hevur tann avvarðandi ikki altíð verið førur fyri at

svara øllum spurningunum.

Fyri at eitt spurnablað var brúkiligt at taka við í samanteljingarnar ásetti nevndin fylgjandi minstu krøv:

spurningur 1 og 2 eru svaraðir

ella

spurningur 1 og 6 eru svaraðir

ella

spurningur 1 og 7 eru svaraðir.

Bólkurin av ungfólki, sum hava sent eitt - sambært hesi krøv - brúkiligt spurnablað aftur, verður nevndur svarhópurin. Á henda hátt koma 2320 ungfólk í svarhópin, einans 24 spurnabløð luku ikki minsta kravið. Nevndin metir ikki, at hetta rættiliga lagaliga minsta kravið órógvar úrslitini stórvegis.

Í øllum talvum er tilskilað, hvussu nógv hava "ikki svarað tí spurninginum". Fyri spurning 6 og 7 er parturin "ikki svarað tí spurninginum" um 5 % av teimum, sum eri "í vinnu", t.e. tey, sum hvørki ganga í skúla ella eru í læru/útbúgving. Fyri spurningarnar 8-12 er hetta tal 8-11 %, og fyri spurning 13 eru 24 %, sum ikki hava svarað, men í tí førinum gera serligar umstøður seg galdandi (verður umrøtt seinni).

UMBOÐAN

Ein avgerandi spurningur er nú: Hvussu álítandi er kanningin?

Har eru fleiri viðurskifti at hava í huga. Fyrst tey aftursendu spurnabløðini, har kunnu skeivleikar vera komnir í, t.d. við at krossur er settur við ein svarmøguleika, ið ikki er tann rætti hjá viðkomandi. Fyri teir flestu spurningarnar á spurnablaðnum hevur tó neyvan verið nakar ivi hjá frásøgufólkunum at svara. Men sjálvandi kann onkur av óvart hava sett krossin skeivt.

Einstakir spurningar, eitt nú 4, 5, 12 og 13, hava ivaleyst givið nógvum frásøgufólkum trupulleikar, svarmøguleikarnir eru ikki allir heilt eintýðugir. Í sambandi við spurning 6 og 7 er hugsandi, at nøkur frásøgufólk hava mett skeivt um, hvussu nógvar dagar tey hava havt arbeiði í nevndu tíðarskeiðum. Onkur hevur kanska í spurningi 7 sett kross við "10-20 dagar", tá svarið átti at verið "21-50 dagar", men tað øvugta kann eisini vera komið fyri.

Tikið samanum halda vit ikki, at teir skeivleikar, ið kunnu standast av sjálvum spurnablaðnum, ávirka kanningarúrslitini munandi.

Øðrvísi kann vera við teimum skeivleikum, ið standast av, at um leið 1000 frásøgufólk hava ikki svarað spurnablaðnum. Kann tað hugsast, at arbeiðsstøðan hjá teimum er munandi øðrvísi enn hjá svarhópinum?

Soleiðis sum kanningin er fyriskipað, hevur tað borið til at gera býti av øllum frásøgufólkunum í mun til høvuðseyðkennini, bæði teimum, sum eru í svarhópinum og teimum, sum ikki hava svarað spurnablaðnum. Hesi býtini eru at finna í skjali 3, har "ikki svarað" til spurning 1 (Hvat tekst tú við í løtuni?) svarar til, at spurnablaðið er ikki svarað. Millum mannfólk og konufólk er lutfalsliga eingin munur, at kalla. Eftir aldri er nakað av muni, 26 % av teimum 17 ára gomlu og 41 % av teimum 20 ára gomlu hava ikki svarað. Í mun til øki er størsti munurin millum S.E.V. norðara part og Sandoy-Suðuroy við ávikavist 28 % og 39 %, sum ikki hava svarað. Í mun til kommunustødd er eingin stórvegis munur.

Okkum er upplýst, at í skúlaárinum 1981/82 gingu um 630 í aldursbólkinum 16-20 ár á HF/studentaskúla. Í mun til tey 4100 í kanningarhópinum er hetta 15,4 %. Sambært skjal 9 hava 412 av teimum 2320 í svarhópinum, t.e. 17,8%, svarað "HF/Studentaskúla" í spurningi 2. Somuleiðis er við teimum, sum eru í handverkaralæru, tey eru um 9,2 % av kanningarhópinum og 11,6 % í svarhópinum.

Hesi úrslit benda á, at útbúgvingarbólkurin er nakað yvirumboðaður í svarhópinum.

Til at eftirkanna umboðanina í kanningini eru inntøkutøl fyri 1981 fingin til vega. Sum vera man er stórur munur á inntøkubýtinum hjá útbúgvingar- og vinnubólkinum, skattskylduga ársinntøkan er í miðal ávikavist 26 og 49 túsund krónur.

Í skjali 4 er gjørd ein sundurbýting av teimum, sum eru "í útbúgving", "í vinnu" og "ikki svarað", eftir um inntøkan er minni ella størri enn 4o tús. kr., og tey sum hava inntøku 0 ella eru flutt í 1981 eru farin í ein bólk. Sundurbýtingin er skipað eftir teimum fimm økjunum.

Er býtið millum tey, sum ikki hava svarað spurnablaðnum, tað sama, sum í svarhópinum, kann ein vænta, at t.d. parturin við inntøku størri enn 40 tús. kr. liggur nøkulunda mitt ímillum somu partar í útbúgvingar- og vinnubólkinum (t.e. niðasti svarti stabbin høgrumegin er størri enn tann ovasti og minni enn tann mittasti).

Millum tey ymsu økini er rættiliga stórur munur at síggja. T.d. fyri Suðureysturoy líkist bólkurin við teimum, sum ikki hava svarað, meiri útbúgvingarbólkinum enn vinnubólkinum, meðan hann fyri Norðoyar meira líkist vinnubólkinum. Hetta kundi týtt uppá, at munirnir millum økini ikki eru so stórir, sum tølini í skjali 6 benda á.

Hóast hesar ójavnar millum økini halda vit, at kanningarúrslitini sum heild geva eina rættiliga álítandi mynd av veruleikanum.

# KANNINGARÚRSLIT

HØVUÐSEYÐKENNI

Sum nevnt í tí setningi, sum nevndin arbeiðir eftir, skulu umstøðurnar í mun til ávís eyðkenni kannast, eitt nú í mun til kyn, aldur og bústað. Viðvíkjandi bústaði hevur nevndin valt at bólka eftir tveimum eyðkennum: hvar í landinum og støðd á bústaðarkommunu. Hesi fýra eyðkennini

kyn

aldur

øki

kommunustødd

verða hereftir nevnd høvuðseyðkennini. Landið er býtt í 5 øki:




1. Suðurstreymoy
2. Suðureysturoy
3. S-E-V norðari partur
4. Norðoyar
5. Sandoy - Suðuroy

Kommunurnar eru býttar í 4 bólkar

Tórshavn

1000 - 5000 íbúgvar

500 - 1000 "

upp til 500 "

UNGDÓMUR Í VINNU

Tey, sum hvørki ganga í skúla ella eru í læru/útbúgving, siga vit eru "í vinnu", verða eisini her nevnd vinnubólkurin. Hesi hava svarað spurningunum 6-13. Niðanfyri eru gjørdar viðmerkingar til býtið av hesum spurningum í mun til høvuðseyðkennini (skjal 5, síða 1-8).

SPURNINGUR 6: Um leið hvussu leingi vart tú í arbeiði heystið 1981 frá 17. august til jóla?

ØLL: Svarini býttu seg soleiðis:

12 % styttri enn 1 mánað
20 % 1-2 mánaðir
63 % 3-4 mánaðir
5 % ikki svarað

Her sæst, at t.d. áttandi hvør arbeiddi styttri enn ein mánað um heystið 1981 (frá 17. august til jóla 1981). Um ein triðingur hevur arbeitt í upp til helvtina av tíðarskeiðinum.

KYN: Dupult so nógv konufólk sum mannfólk hava lítið og onki arbeiði (styttri enn 1 mánað).

ALDUR: Eitt sindur ójavnt er hvussu teir ymsu árgangirnir eru fyri. Lutfalsliga eru tað flest 20 ára gomul, ið hava arbeitt meginpartin av tíðarskeiðinum. Millum tey 17 og 18 ára gomlu eru fleiri, ið lítið og onki arbeiði hava havt í mun til hinar árgangirnar.

ØKI: Økið Suðureysturoy skilir seg burturúr, her hava 7 % arbeitt minni enn ein mánað í mun til 12-15 % í hinum økjunum, 20 % hava arbeitt í upp til 2 mánaðir í mun til 32-38 % í hinum økjunum og 76 % hava arbeitt 3-4 mánaðir, í hinum økjunum 56-62 %.

STØDD: Myndin bendir á, at jú minni kommunan er, jú fleiri ungfólk hava longri arbeiðsskeið. Viðmerkjast skal tó, at munurin á økjunum kann órógva nakað; kommunurnar í Suðureysturoy eru allar í stødd millum 500-2500, so støðan í kommunum í støddarbólkunum 500-1000 og 1000-5000 hevði verið verri um Suðureysturoy ikki var uppií.

SPURNINGUR 7: Um leið hvussu nógvar dagar hesar tríggjar mánaðirnar hevur tú verið í arbeiði?

ØLL: Svarini býttu seg soleiðis:

11 % færri enn 10 dagar
 9 % 10-20 dagar
30 % 21-50 dagar
45 % fleiri enn 50 dagar
 5 % ikki svarað.

Her sæst, at t.d. fimta hvørt ungfólk hevur havt arbeiði í færri enn 21 arbeiðsdagar várið 1982 (4. jan. - 28. mars 1982).

KYN: Eins og um heystið 1981 hava konufólkini havt minni arbeiði enn mannfólkini.

ALDUR: Tey 20 ára gomlu skilja seg burturúr, eins og í spurningi 6, har mest arbeiði er. Økini Norðoyar og Sandoy-Suðuroy eru ringast fyri.

STØDD: Stórt sæð sama býtið er í stórum og smáum kommunum. Sum nevnt í spurningi 6 var munur viðvíkjandi arbeiði um heystið 1981. Ein útjavning tykist at vera farin fram, men vit meta tey viðurskifti, ið hava ávirkað gongdina, neyvan hava nakað við kommunustødd at gera.

SPURNINGUR 8: Hvussu nógvastaðni hevur tú roynt at fáa arbeiði hesar tríggjar mánaðirnar?

Samanbera vit henda spurning við spurning 7, sæst ein - ikki óvæntaður - samanhangur: betri arbeiðsstøðan er, jú minni hava tey roynt at fáa arbeiði. Ein beinleiðis samankoyring millum spurning 7 og 8 (skjal 7) prógvar eisini hetta. T.d. sæst, at tey 20 ára gomlu, sum eru frægast fyri við arbeiði, hava roynt minst.

SPURNINGUR 9: Hvørjar ætlanir hevur tú komandi hálva árið?

Nær um dupult so nógv konufólk sum mannfólk fara at royna at fáa sær fast arbeiði. Men væl fleiri mannfólk halda fram við at arbeiða.

Í mun til aldur eru serliga nógv 17 ára gomul, ið fara á skúla. Millum tey 17-18 ára gomlu eru upp á seg fleiri, sum fara at royna at fáa fast arbeiði. Viðv.

øki skilir Suðurstreymoy seg nakað burturúr: har eru tað flest, sum fara í læru/útbúgving og fægst, ið ikki vita, hvat tey ætla sær.

Í summum bólkum er "ikki svarað" ein rættiliga stórur partur (upp í 12 %). Hetta kann hugsast at standast av, at ein avvarðandi, ið ikki veit um framtíðarætlanirnar, hevur svarað fyri eitt ungfólk, sum t.d. er til skips.

SPURNINGUR 10: Á hvussu nógvum arbeiðsplássum hevur tú havt arbeiði síðan 17. august 1981?

Í hesum spurningi sæst parturin "ikki svarað" at vera rættiliga stórur (6-14 %), og hetta stendst einamest av, at tey, sum als einki arbeiði hava havt síðan 17. august 1981, skulu ikki svara hesum spurningi, og heldur ikki spurningarnar 11, 12 og 13.

Sum heild hava 62 % verið á einum arbeiðsplássi í styttri ella longri tíð í tíðini frá 17. august 1981 til 28. mars 1982, 23 % á tveimum og 4 % á fleiri arbeiðsplássum. Ein munur sæst millum mannfólk og konufólk, fleiri mannfólk hava verið á tveimum ella fleiri arbeiðsplássum. Við vaksandi aldri kann hómast ein øking í tí partinum, sum hevur verið á einum arbeiðsplássi. Smáir munir eru í mun til øki, meðan lítil og ongin munur er á støddarbólkunum.

SPURNINGUR 11: Hvat slag av arbeiði hevur/hevði tú?

Sum heild er býtið á svarunum:

20 % rógvi út/eri til skips
22 % fiskaarbeiði á landi
13 % á skrivstovu/í handli
37 % annað arbeiði
8 % ikki svarað.

Bólkurin "annað arbeiði" er rættiliga fjøltáttaður: byggiarbeiði, á verkstaði, í húsi, barnaansing v.m.

Stórir munir eru at síggja á høvuðseyðkennunum. Sum væntað eru tað at kalla bert mannfólk, sum rógva út ella eru til skips, og at "á skrivstovu/í handli" eru nógv fleiri konufólk. Í fiskaarbeiði á landi eru væl fleiri konufólk (27 %) enn mannfólk (16 %). Millum konufólk eru um tríggjar ferðir fleiri, sum ikki

svara hesum spurningi enn millum mannfólk (13 % og 4 %). Hetta kann hanga saman við, at tað eru upp á seg fleiri konufólk, sum als einki arbeiði hava havt. Í mun til aldur er eitt týðuligt mynstur, jú eldri tey ungu verða, jú færri fara á sjógvin, meðan bólkurin "annað arbeiði" veksur tilsvarandi.

SPURNINGUR 12: Hvussu er/var tín arbeiðstíð?

Sum heild er býtið av svarunum:

49 % rættiliga fast tímatal hvørja arbeiðsviku
41 % skiftandi tímatal hvørja arbeiðsviku
10 % ikki svarað

"Rættiliga fast" og "skiftandi" eru ikki heilt eintýðug, so tað er væl hugsandi, at fleiri í svarhópinum hava ivast í, hvat tey skulu svara til henda spurningin.

Hóast hesa óvissu halda vit, at svarini kunnu geva eina ábending um arbeiðstíðina.

Millum mannfólk og konufólk sæst ein munur, fleiri konufólk enn mannfólk hava "rættiliga fast tímatal hvørja viku". Tað tykist sum parturin, ið hevur "rættiliga fast tímatal hvørja viku" økist við aldrinum. Suðurstreymoy og Suðureysturoy skilja seg burturúr, har eru tað fleiri, ið hava fast tímatal. Í mun til kommunustødd er ein klárur tendensur: jú minni kommunan er, jú meiri skiftandi verður arbeiðstíðin.

SPURNINGUR 13: Hvussu langt er/var millum bústað og arbeiðspláss?

Sum heild er býtið av svarunum:

60 % styttri enn 12 km
10 % 12-25 km
7 % longri enn 25 km
24 % ikki svarað

Fjórði hvør í vinnu hevur ikki svarað hesum spurningi, og stendst tað einamest av, at tey, sum hava verið til skips, hava ivast hvussu tey skulu svara - sum rímuligt er. Tað svarið, ið ein við stórari vissu kann meta um, er "styttri enn 12 km", og har eru munir

at siggja. Fleiri konufólk enn mannfólk, og undantikið 16 ár, er at kalla ongin munur á aldri. Økini S.E.V. og Sandoy-Suðuroy skilja seg burturúr, har færri eru, og í minni kommunum eru færri, har fráleikin millum bústað og arbeiðspláss er styttri enn 12 km.

HEYSTIÐ 81 / VÁRIÐ 82

Í skjali 6 er víst ein samanbering av arbeiðsstøðuni um heystið 1981 og várið 1982. Dentur er lagdur á at lýsa støðuna hjá teimum, ið hava lítið arbeiði, og hetta er gjørt við at meta um hvussu nógv, ið hava arbeiði í minni enn fjórðingin av arbeiðstíðini. Um heystið 1981 svarar tann fyrsti svarmøguleikin til hesa arbeiðsnøgd. Fyri várið 1982 er helvtin av teimum, sum svara 10-20 arbeiðsdagar, tikin við í bólkin "minni enn fjórðingin av arbeiðstíðini", meðan hin helvtin er løgd saman við teimum, ið hava meira arbeiði. Samanbering er gjørd fyri alt landið og fyri økini.

Myndin fevnir bert um tey, ið hava "minni enn fjórðingin av arbeiðstíðini" um heystið 1981 og várið 1982. Longri niðri á myndini, ið eitt øki finst, verri er støðan í økinum, við tað at fleiri eru við lítlum arbeiði. Meira hall, ið strikan millum heystið 1981 og várið 1982 hevur, størri er broytingin.

Á myndini sæst tann samlaða støðan í økjunum, men tað sæst ikki, um tað eru tey somu, ið hava lítið arbeiði bæði skeiðini.

